


## Pauli verður helst tøkur

Einasta veruliga ivamálið í hópinum undan dystinum mikukvøldið er Pauli G. Hansen. Pauli fekk eina harðliga stempling á leggin móti dystarenda mikukvøldið, og at byrja við bóru menn ótta fyri, at talan kanska var um heilt álvarsligan skaða. Ein vitjan á røntguni staðfesti tó, at talan ikki var um nakað brot, men beinið er tó rættiliga hovið.
- Eg bæði vóni og rokni við, at eg eri tøkur mikukvøldið. Enn er tó best at binda nøkunlunda frið, men tað gongur rætta vegin hampuliga skjótt, segði Pauli undir venjingini mánadagin.

## Danir imponeraðir av Liktinstein

Danski fótbóltsvenjarin Morten Olsen er ovfarin av spælinum hjá lítlu fótbóltstjóðini, Liktinstein, og hann roknar við einum truplum EM-dysti hjá Danmark í annaðkvøld.
- Teir hava kláráð seg væl við at spæla álopsfótbólt, og fríggjadagin vóru teir betur enn Eysturríki. Í Mario Frick eigur Liktinstein ein álopsspælarar á europeiskum støði, sigur Morten Olsen við Ritzau.
Hann roknar tí ikki við, at Liktinstein fer at grava seg niður í dystinum ímóti dønum mikukvøldið.
- Eingin roknar við, at Liktinstein kann koma til EM-endaspælið, og tí tora teir at spæla fyri at vinna onkrar dystir, sigur Morten Olsen.

## Kvinnurnar til Makedonia

Føroyska kvinnulandsliðið í fótbólti skal spæla EM-undankapping í Makedonia í november mánaði. Í gjár var lutakast í Nyon, og Føroyar komu í bólk saman við Makedonia, Wales og Kazakhstan.
Londini hittast í Makedonia seint í november mánaði, og har fara liðini at spælaein dyst ímóti hvørjum øðrum í eini mini-kapping. Vinnarin av hesum bólki sleppur víðari í kappingini og skal taka lut í vanligu undankappingini til EM í 2008. Kvinnulandsliðið er farið undir fyrireikingarnar til EM-kappingina, og vant verður fleiri ferðir um vikuna við landsliðshópinum.

## Steypafinalan flutt ein tíma

FSF boðar nú frá, at finalan í kappingini um Løgmanssteypið ikki verður spæld sum ætlað leygardagin. Dysturin var ásettur at verða spældur klokkan 16.00, men FSF hevur nú flutt dystin ein tíma, so at hann byrjar klokkan 15.00. Hetta verður gjørt orsaka av, at tað er blivið myrkari í veðrinum og eingi ljós eru á Tórsvølli, har dysturin verður spældur.

## Eingir skaðar í Start

Felagið hjá Toda Jónsson strembar eftir at vinna heiðursmerki í norsku tippuliguni í ár. Start liggur á fjórða plássi í kappingini, nú tað mangla fýra dystir at spæla, og fýra stig eru fram til Lillestrøm, sum liggur nummar trý. Í Start fegnast tey um, at eingir skaðar eru í hópinum, nú seinastu dystirnir standa fyri framman. Felagið hevur annars verið illa plágað av skaðum í ár.

# Jákup aftur á miðvøllinum

**Hann spælir har, sum venjarin vil hava hann, men kortini fegnast Jákup á Borg um, at hann nú aftur er at síggja á miðvøllinum heldur enn í verjuni**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*




*- Tað er einki at ivast í, at trýstið verður øgiligt fyrstu longu løtuna. Og megna vit at koma livandi gjøgnum tann partin, so kann dysturin gerast heilt góður fyri okkara viðkomandi, sigur Jákup á Borg undan dystinum ímóti Fraklandi*

Eitt av stóru kjakevnunum, tá føroyskur landsliðsfótbóltur hevur verið á mannamunni, er, hvørt Jákup á Borg skal nýtast sum bakkur ella vongspælari á landsliðnum. Fólkakravið hevur rættiliga greitt verið, at havnarmaðurin skuldi fram aftur á miðvøllin, og leygardagin varð kravið eisini eftirlíkað.
- Sjálvandi var tað gott at spæla á miðvøllinum aftur. Sjálvt um eg altíð geri mítt besta, har sum venjarin biður meg spæla, so er miðvøllurin jú eitt pláss, sum eg kenni munandi betri, og har eg tí havi lættari við at spæla upp til mítt besta.

**Kunnu frustrerast**
Mikukvøldið verður Jákup uttan iva aftur á vanda plássinum, og hann heldur, at sannlíkindini fyri einum góðum føroyskum úrsliti eru góð.
- Megna vit at halda støðinum, sum vit løgdu leygardagin, so gongur tað neyvan heilt galið. Men tú skalt tó minnast til, at hetta er eitt av heimsins bestu liðum, og tað at teir júst hava tapt fyri Skotlandi ger neyvan okkara uppgávu lættari.
- Men júst tað tapið kann væl eisini bera við sær, at teir verða lættari at frustrera. Tað er einki at ivast í, at trýstið verður øgiligt fyrstu longu løtuna. Og megna vit at koma livandi gjøgnum tann partin, so kann dysturin gerast heilt góður fyri okkara viðkomandi. Móti Litava megnaðu vit væl at taka ferðina úr dystinum, og tað verður so eisini aðalmálið hesaferð. Tað sær kanska ikki so pent út, tá menn liggja fyri eitt gott orð, men ganga minuttirnir, so telja teir jú til okkara fyrimun. Tað kann vónandi frustrera teir nakað, og tað vil so altíð telja til okkar fyrimun.
Eisini um teir gera sum litavarnir, og gloyma alt um fair-play?
- Tað, sum hendi har, var bara for langt úti. Sjálvandi er tað eisini eitt tekin um, hvussu kroystir teir vóru, men hatta var eisini undir allan kritikk. Tað góvu okkara áskoðarar eisini til kennar. Og tað merkti eisini lagið eftir dystin. Sjálvur segði eg í øllum førum, tá ein av teirra spælarum vildi býta um troyggju eftir dystin, at tað hevði eg snøgt sagt ongan hug til, sigur Jákup.

# Fremad-venjarin saknar Andrew

**Tað hevur gingið sera illa hjá danska 1. deildarfelagnum Fremad Amager seinasta mánaðin. Venjarin, sum sigur seg sakna sentralar spælarar á liðnum, biður øll í felagnum um at standa saman**

FÓTBÓLTUR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Fremad Amager fekk góða byrjan, tá ið danska 1. deild byrja í summar, men í september mánaði gekk heilt galið hjá liðnum. Seinastu fimm dystirnar hevur Fremad Amager bert fingið eitt stig, og nú er liðið farið at nærkast botninum í 1. deild.
- Vit høvdu eina líknandi kreppu í oktober mánaði í fjør, tá ið vit taptu fýra dystir, men hesaferð er kreppan komin í september. Vit hava mist sjálvsálit, men nú mugu spælararnir royna at koma fyri seg aftur, sigur venjarin Benny Johansen við heimasíðuna hjá Fremad Amager.
- Eg havi havt nógvar samrøður við spælararnar síðstu vikurnar, og hetta snýr seg meira um eitt mentalt problem enn nakað fysiskt. Við øllum tapunum eru spælararnir blivnir bangnir fyri at gera mistøk, og liðið er ikki nóg ágangandi, sigur venjarin.

**Mangla Andrew og aðrar**
Benny Johansen sigur, at tað hevur verið trupult hjá liðnum at mangla sentralar spælarar sum Andrew av Fløtum, Kenny Thorup og Igor Vujanvic. Allir hava havt skaða í langa tíð, og Benny Johansen stúrir fyri, at teir spæla ikki aftur í ár.
Venjarin heldur, at nú ræður um at standa saman í felagnum, so at skeiva gongdin kann vendast.
- Vit hava í felag gjørt av, at vit skulu koma burtur úr hesum. Vit skulu ikki geva hvørjum øðrum skyldina fyri gongdina, men taka standa saman og arbeiða hart, sigur Benny Johansen.